ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*– Vanliga verður roknað við, at ein fullsettur Tórsvøllur gevur um eina millión í kassan*

# Hálva millión skeiva vegin

**FSF hevur eitt munandi hall í rokskapinum, sum verður lagdur fyri aðalfundin leygardagin. Lítið er tó at ivast í, at heimadystir móti Skotlandi, Italia og Fraklandi skulu bjarga inntøkunum í 2007**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt hall upp á 509.164 kr. Tað er botnlinjan í roknskapinum, sum nevndin í FSF fer at leggja fyri aðalfundin. leygardagin.

Talan er um eitt hall av teimum størru, og hóast eginpeningurin enn táttar ímóti teimum 18 milliónunum, so er hesin í stóran mun bundin í bygningin við Tórsvøll, sum við UEFA- og landskassastuðli gav eginognini eitt ordans lyft í síni tíð.


*Fremsta vónin hjá FSF er helst, at talan aftur verður um fullsettan Tórsvøll, tá Frakland og Italia koma á vitjan í summar*

### Heimdystirnir á muni

Størsta orsøkin til hallið skal helst finnast í vantandi inntøkum fyri atgongumerki. Skráin fyri heimadystirnar hjá A-landsliðnum í 2006 var á ongan hátt tann mest áhugaverda í føroyskari fótbóltssøgu.

Dystirnir móti Georgia og Litava góvu saman við finaluni um løgmanssteypið einans 772 tkr. í kassan, og tað er væl undir tað, sum eitt miðal ár vanliga gevur. Og hóast áhugin fyri A-landsliðnum onkra tíð hevur verið størri, enn hann tykist vera í dag, so er lítið at ivast í, at dystirnir komandi árið fara at fylla væl meira í pengakassan.

Soleiðis verður vanliga roknað við, at ein fullsettur Tórsvøllur gevur um eina millión í kassan. Og við heimadystum móti trimum av teimum átta sterkastu tjóðunum í heiminum, umframt Skotlandi, sum vanliga hevur tað trupult í Føroyum, skulu útlitini fyri øktum inntøkum verið heilt góð. Og verður talan um tvey lið við nógvum áskoðarum í steypafinaluni, er als ikki ósannlíkt, at áskoðarainntøkurnar í 2007 fara at tátta í tær tríggjar milliónirnar. Eitt tal, sum FSF tó neyvan torir at seta í fíggjarætlanina.

### Fleiri útidystir

Hinvegin fylgja útreiðslur eisini við teimum fýra útidystunum, sum eru á skránni í 2007. Men hóast tað fyrisitingarliga neyvan er tað mest áhugaverda við trimum ferðum eystur um gamla jarntjaldið, so plaga hesar ferðir í krónum og oyrum ikki at teljast millum tær dýrastu. Eitt spjaldur, sum tó neyvan kann setast á seinastu ferðina á árinum, tá farið verður til Italia.

### Gott gjaldføri

Á fíggjarsíðuni er tað bygningurin við Tórsvøll, sum vigar mest, men eisini gjaldførið hjá felagsskapinum tykist gott. Soleiðis eru stuttfreistaðu skyldurnar 7.844 tkr., og hesar verða væl og virðiliga uppvigaðar av skjótt umsetiligari ogn, sum er 12.741 tkr. Av hesum eru 5.701 tkr. tøkur peningur, og tí hevur FSF ongar trupulleikar í at røkja gjaldsskyldur sínar.

Ein stórur spurningur til fíggjarætlanina fyri 2007 verður helst, hvussu FSF ætlar at fíggja arbeiðið við U-21 landsliðnum. Her hevur verið ført fram, at útreiðslurnar vera um eina millión – umframt UEFA-stuðulin – og tær inntøkurnar finnast neyvan innan verandi fíggjarkarmar hjá FSF.

## Dystarskrá

Tað er eyðsæð, at býtið av heima- og útidystum er av alstórum týdningi fyri FSF-roknskapin. Niðan fyri sæst, hvørjar landsdystir A-landsliðið hevur spælt seinastu tvey árini, og hvørjir dystir standa fyri framman í 2007.

**2005**
Heimadystir
Føroyar-Sveis
Føroyar-Írland
Føroyar-Cypros
Føroyar-Ísrael

**Útidystir**
Frakland-Føroyar
Ísrael-Føroyar

**2006**
Heimadystir
Føroyar-Georgia
Føroyar-Litava

**Útidystir**
Póland-Føroyar
Skotland-Føroyar
Frakland-Føroyar

**2007**
Heimadystir
Føroyar-Ukraina
Føroyar-Italia
Føroyar-Skotland
Føroyar-Frakland

**Útidystir**
Georgia-Føroyar
Litava-Føroyar
Ukraina-Føroyar
Italia-Føroyar

## Móttøka fyri Jens Eriki

Aðalfundurin hjá FSF verður tann seinasti við Jens Erik Magnussen við nevndarborðið. Jens Erik hevur verið partur av FSF-nevndini, síðani felagsskapurin varð settur á stovn í 1979, men hann hevur boðað frá, at hann nú fer at takka fyri seg í hesum høpi.



Jens Erik er tann seinasti av upprunaligu nevndarlimunum, sum leggur frá sær, og eftir trúgvu og dyggu tænastuna hevur FSF boðað frá, at móttøka verður skipað eftir aðalfundin. Hendan verður eisini í FSF-húsinum, og verður roknað við, at hendan byrjar umleið kl. 13.